


## Á TV3 sunnukvøldið kl. 20.00



*Black Hawk Down er ein reinur krígsfilmur, ið er grundaður á veruligar hendingar*



*Ewan McGregor sum skrivstovumaðurin Grimes*

# Black Hawk Down

Mæti filmsleikstjórin Ridley Scott er maðurin aftan fyri hendan krígsfilmin. Filmurin er grundaður á ein nærum gloymdan part av amerikanskari hernaðarsøgu. Hin 3. oktober í 1993 verður ein hernaðarlig úrvalsdeild, ið telur yvir 100 Delta Force hermenn send til tað borgarakrígsrakta Somalia. Her eru longu eisini friðarveitandi herdeildir útsendar frá ST. Men uppgávan hjá amerikansku hermonnunum er at ræna tveir týdningarmiklar loytnantar hjá krígsharranum í stórbýnum Mogadishu, Mohamed Farah Aidi. Í úrvalsdeildini eru millum aðrar Grimes (Ewan McGregor), Sersjantur Matt Eversmann (Josh Hartnett), Ranger Lt. Col. Danny Mcknight (Tom Sizemore) og so tann útspekuleraði Delta Sersjanturin Jeff Sanderson (William Fichtner). Grimes hoyrir heima aftan fyri skrivstovuborðið, og hann fær ovmikið at hugsa um, nú hann endar úti á stríðsvøllinum. Støðan gerst av álvara vandamikil, tá tvær av stríðstyrlunum verða skotnar niður. Mitt í somaliska stórbýnum Mogadishu gerst støðan alsamt meiri hættislig. Amerikanararnir verða kringsettir av fíggindanum, ein 15 tíma náðileysur bardagi byrjar.

## ÁCanal+ mánakvøld til fríggjakvøld kl. 21.30



*Jon Stewart - eisini kendur úr Saturday Night Live - á odda í The Daily Show with Jon Stewart*

# The Daily Show with Jon Stewart

Ein av talkshow-sendingunum, ið fær mestu umrøðuna í amerikanska samfelagnum er The Daily Show with Jon Stewart. Í seinastuni hevur hendan sendingin havt serliga góðan byr. Sambært almennum hyggjarahagtølum hevur sendingin hjá Jon Stewart tikið seg nógv inn á hinar báðar kendu sendingarnar yviri í statunum - The Tonight Show við Jay Leno og talkshowinum hjá David Letterman. Fleiri og fleiri í aldrinum millum 18 - 29 fylgja við hesi sending og savna sær politisk tíðindi frá hesi sending. Ein kanning gjørd av "Pew Research Center for the People and the Press" vísir at 21% av amerikanum í hesum aldrinum regluliga innheinta tað seinasta úr valstríðnum frá The Daily Show with Jon Stewart. Ein møgulig orsøk til hetta er, at Jon Stewart ger mest burturúr at nýta speiskar viðmerkingar til tað, sum er frammi í valdystinum. Eingin politikari kann kenna seg tryggan, tá Jon Stewart fer í gongd við sínum áleypandi viðmerkingum. Bæði George Bush og John Kerry fáa toyggið. Bush, serliga fyri sína nú heimskendu mismælsku, og Kerry, serliga fyri sínar alt ov langu frágreiðingar um einfald viðurskiftir. Vitjan av ymiskum kendum persónum er afturvendandi táttur í sendingunum, t.d. hava Bill Clinton, John Kerry, Tom Hanks, Michael Moore vitjað og herfyri var suðurafrikanski biskupurin Desmond Tutu á vitjan. Afturat fleiri hyggjarum hevur sendingin vunnið tvær Emmy-virðislønir, fyri bestu skemtirøð og besta handrit. Canal+ vísir ta nógv róstu undirhaldssendingina fýra kvøld um vikuna, ein dag eftir amerikanska sending, mánakvøld til fríggjakvøld kl. 21.30.



*Jon Stewart og sjónvarpslið hansara: Lewis Black, Samantha Bee, Steve Carell, Stephen Colbert, Rob Corddry, Ed Helms og Stacey Grenrock-Woods*



## FILMSTEIGURIN

# Fahrenheit 9/11

Nógv umtalaði og skelkandi filmurin hjá Michael Moore verður fríggjakvøldið frumsýndur í Havnar Bio. Talan er um ein dokumentarfilm, ið vísir baksíðuna av politiska lívinum í Amerika. Filmurin hevur av álvara fingið amerikanska fólkið at øtast

Filmurin »Fahrenheit 9/11« er samansettur av tilfari frá einum kameraliði, sum tók upp ímillum amerikanskar hermenn í Irak og Afganistan, ymiskum skjølum frá Hvítu húsunum og frá 9/11-nevndini, ymsum upptøkum frá tíðindasendingum, eins og Moore sjálvur eisini kemur við persónligum viðmerkingum og upptøkum ígjøgnum filmin. Millum annað gongur hann aftaná limum í kongressini, og roynir at fáa teir at undirskriva eitt skjal, har teir vátta, at senda synir sínar til frontin í Irak.

Filmurin er eitt álop á førda uttanríkispolitikkin hjá Bush. Hetta ger Moore til dømis við at peika á ávaringarnar, sum CIA um summarið í 2001 gav stjórnini, um eitt komandi terrorálop á New York.

Eisini vísir hann á hvussu grádig stjórnin og oljufeløgini vóru eftir 9/11, har tey í stóran mun hugsaðu um vinning heldur enn um mannalagnur.

Filmurin kemur dátt við hjá Bush stjórnini, nú val stendur fyri durum, og tað sigst eisini, at Bush setti nógv inn fyri at steðga hesum filminum. Hetta eydnaðist sum kunnugt ikki, og filmurin fer ivaleyst at hava sína ávirkan á valið.

Moore fjalir ikki yvir, at hann er ein subjektivur filmsskapari, og filmsummælararnir eru ógvuliga ósamdir um filmin. Meðan onkur lovprísar filminum, nevnir onkur hann fyri »tað reina propaganda«.

Men sum L.A. Times sigur tað: »Propaganda hevur størstu ávirkan, tá hon inniheldur nakað av sannleika. Í hesum filminum er so nógv tilfar tikið frá veruligum upptøkum, at tað kann ikki annað enn geva eina varandi ávirkan á hyggjaran«

**–eys–**





*»Eg haldi, at hvør einasti amerikani átti at sæð hann«*

*Bill Clinton*

*»Eg má fara á val í ár. Eftir at hava sæð handan filmin, kann eg ikki gera nakað annað«*

*Mary J. Blige*

*» Eg vænti, at øll fara at tosa um hendan filmin. Og eg haldi, at nógv av teimum, sum ivast í hvat tey skulu velja, fara at vera ivaleys eftir at hava sæð hendan filmin«*

*Leonardo DiCaprio*

*» Eg haldi ikki, at eg nakrantíð í lívinum havi grátið so illa, tá eg havi hugt at einum filmi. Eg vil staðiliga mæla øllum til at síggja hann«*

*Madonna*

*»Ein filmur kann vera stuttligur (...) Hann kann fáa meg at gráta. Hann kann fáa meg at flenna. Hann kann órógva meg. Hann kann fylla meg við stoltleika. Hesin filmuin gjørdi alt hetta«*

*Quentin Tarantino*


HAVNAR BIO
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




**Frumsýning**
Fríggjadagin 15.10. kl. $18^{30}$ Fríggjadagin 15.10. kl. $20^{15}$
Leygardagin 16.10. kl. $18^{30}$ Leygardagin 16.10. kl. $20^{15}$
Sunnudagin 17.10. kl. $18^{00}$ Sunnudagin 17.10. kl. $19^{45}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




Fríggjadagin 15.10. kl. $21^{00}$ Leygardagin 16.10. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 17.10. kl. $20^{30}$




Fríggjadagin 15.10. kl. $23^{15}$ Leygardagin 16.10. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 17.10. kl. $22^{45}$




Fríggjadagin 15.10. kl. $16^{30}$ Leygardagin 16.10. kl. $16^{30}$
Sunnudagin 17.10. kl. $16^{00}$




**Við danskari talu – Billettprísur: 55,- kr.**
Fríggjadagin 15.10. kl. $18^{00}$ Leygardagin 16.10. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 17.10. kl. $17^{30}$




Fríggjadagin 15.10. kl. $22^{45}$ Leygardagin 16.10. kl. $22^{45}$
Sunnudagin 17.10. kl. $22^{15}$